Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 11 |
| Tíð: | 09-09-2021 Kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur.
Tað lá ikki fyri hjá Julionnu Klett at møta. Ei heldur hjá fyrstvalda varalimi, Ingigerð á Trøðni. Robert Vilhelmsen, sum er næsti varalimur møtti ikki.

**Fundarskrá:**

1. Luttøka á ráðstevnu um Demens í Norðurlandahúsinum. Víst verður til avgerð í emaili tann 7. september um luttøku.
2. Eldrakvøld í Tilhaldinum, sum Eldraráðið skipar fyri. Áseta m.a. dag.
3. Ymist.

AD 1 Lutttøka á ráðstevnu um Demens

Tórshavnar kommuna hevur boðað frá, at limir og somuleiðis varalimir í Eldraráðnum, sum hava hug at luttaka á skeiðnum, kunnu fáa skeiðsgjaldið endurgoldið frá Eldraráðnum.
Fráboðan um hetta er send varalimum.

AD 2 Eldrakvøld í Tilhaldinum

Petur hevur verið í samband við Marius Rein um at halda fyrsta kvøld í hósdagstiltakinum hjá Eldraráðnum. Tíverri liggur tað ikki fyri hjá honum at luttaka fyrr enn eftir 2. november.

AD 3 Ymist

Gunnvá Sigursson frá Norðoya Eldraráði hevði sett seg í samband við Katrina og biðið um fund í Klaksvík hin 27. september, har eisini umboð fyri eldrarráðið ”Roðin” fer at møta. Gunnvá helt tað vera hóskiligt at hittast, áðrenn felags fundur við onnur eldraráð var hildin, so sum nomið var við á seinasta fundi, tá vit nevndu, at Landsfelag Pensjónista møguliga átti at skipa fyri einum landsdekkandi fundi.

Petur Rouch hevur biðið um farloyvi frá Eldraráðnum fram til 16. november. Hetta var honum játtað. Ístaðin verður Robert Vilhelmsen biðin um at møta fyri hann hetta tíðarskeiðið.

Fundur lokin klokkan 14:30
Tórshavn tann 11. September 2021.

Petur Rouch, skrivari